LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 1. apríl 2019
J.Nr.: LUM-11- 18/00071-21
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Álit**

viðvíkjandi klagu um vantandi mannagongdir, tá TAKS setti forboðsskeltir upp á tolløkinum á flogvøllinum í Vágum

Við skrivi, dagfest 30. juni 2018, sendi A umboðsmanninum klagu um, at TAKS ikki hevði hildið fyrisitingarligar mannagongdir í sambandi við, at TAKS setti forboðsskeltir upp á tolløkinum á flogvøllinum í Vágum.

Klagari upplýsti, at hann hevði biðið TAKS um innlit í skjøl, sum vístu mannagongdir, hoyring og viðgerð í sambandi við, at TAKS hevði sett forboð ímóti mynda- og videoupptøkum á tolløkinum á flogvøllinum í Vágum, men at TAKS svaraði, at eingi skjøl vóru at lata innlit í. Klagari klagaði svarið frá TAKS til Fíggjarmálaráðið, sum tann 29. apríl 2018 boðaði klagara frá, at ráðið ikki metti, at skjølini í málinum góvu orsøk til nakrar viðmerkingar til, hvussu TAKS skipar viðurskiftini/arbeiðið á tolløkinum á flogvøllinum í Vágum, og at Fíggjarmálaráðið ikki gjørdi meira við málið.

**Málsgongd**

Av tí at partshoyringin niðanfyri lýsir málsviðgerðina í málinum á nøktandi hátt, havi eg valt ikki at gera eina nærri lýsing av málsgongdini í hesum málinum.

**Partshoyring**

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 2. august 2018, varð klagan send TAKS til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur.

Tann 23. august 2018 bað TAKS um longda freist. Tann 30. august 2018 sendi TAKS umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> "...
>
> A bað við skrivi, dagfest 19. apríl 2018, um innlit í "... *nær tað er blivið forboðið, at tryggja seg við upptøkum...*".

undir Bryggjubakka 11 • Postrúm 2008 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 358500 • Faks 358501 • lum@lum.fo • www.lum.fo

Spurningurin um myndaforboð bleiv viðgjørdur sum ein fyrispurningur heldur enn ein umbøn um innlit, av tí at ongi skjøl eru, sum viðvíkja, hvørjar mannagongdir TAKS hevur í mun til forboðið móti myndatøku í tolløkinum í Vága floghavn.

Fíggjarmálaráðið hevur við skrivi, dagfest 29. juni 2018, staðfest avgerðina hjá TAKS, tó við teirri grundgeving, at onki mál er at geva innlit í.

A sigur í skrivinum av 30. juni 2018 til Løgtingsins umboðsmann, at hann nágreiniliga bað um innlit í skjøl, avgerðir og mannagongdir fyri forboðnum móti myndatøku í tolløkinum í Vágunum, og at TAKS hevur brotið fyrisitingarlógina, millum annað av tí at ongar mannagongdir eru gjørdar.

Lógardeildin metir, at TAKS kann gera av at seta forboð fyri myndatøku í tolløkinum í Vága floghavn uttan beinleiðis lógarfesta heimild. Sum nevnt í skrivi av 31. mai 2018 til Fíggjarmálaráðið, er myndaforboðið grundað á atlitið at eftirlitsvirksemi, starvsfólkini og teimum ferðandi, sum av einhvørjari orsøk verða tikin til viks ella fáa viðføri sítt kannað í kanningarøkinum.

*Praksis hjá TAKS*
Skelti (klisturmerki) um myndaforboð í Vága floghavn hava verið uppi síðani januar 2017, og hevur myndaforboðið verið praktiserað, áðrenn skelti komu upp. B, tollleiðari, hevur upplýst (viðheft), at tollararnir ongantíð hava loyvt ferðandi ella øðrum at gera upptøkur, tá ið tollararnir gera sítt eftirlitsarbeiði - undantikið møguligar sjónvarpssendingar, har ið upptøkurnar skulu góðkennast av tollarunum áðrenn sýning.

Í sambandi við viðgerðini av hesum skrivi, hevur B, tollleiðari, fyri Lógardeildini gjørt vart við, at eitt mál er stovnað, har ið spurningurin um heimildin fyri myndaforboðið hevur verið uppi at venda. Sambært telefonnotati, dagfest 6. januar 2017, hevur D klagað um, at hann ikki slapp at taka upp video, meðan hann var til tolleftirlit. Sí viðheft telefonnotat. Lógardeildin kann viðmerkja, at spurningurin um heimild fyri myndaforboð ikki bleiv viðgjørdur.

*Niðurstøða*
Samanumtikið metir Lógardeildin, at TAKS ikki hevur brotið fyrisitingarligar reglur viðvíkjandi myndaforboðnum, og at TAKS hevur heimild at nokta myndatøku á tolløkinum við nevndu atlitum.

...”

Við skrivi, dagfest 13. september 2018, vórðu viðmerkingarnar hjá TAKS sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar. Samstundis sendi umboðsmaðurin TAKS nakrar útgreinandi spurningar.

Umboðsmaðurin bað TAKS greiða sær frá, um TAKS hevur nakra mannagongd, tá forboð fyri myndatøku v.m. verður sett, sum m.a. ger av, hvussu økið, sum forboðið fevnir um, verður avmarkað, hvør kann taka avgerðina, og hvussu avgerðin verður skjalfest.

Tann 28. september 2018 sendi TAKS umboðsmanninum soljóðandi svar uppá útgreinandi spurningarnar:

“...

Siðvenja hevur verið ikki at loyva ferðandi at taka myndir ella video ella aðra upptøku av tollarum ella av einum tolleftirliti. Tað hava ikki verði skeltir, sum hava sagt, at hetta ikki er loyvt, men hetta hevur verið nakað sum tollarar eftir tørvi hava sagt við ferðandi. Mær kunnugt hevur hetta ikki verið nakar trupulleiki og hevur verið góðtikið.

Men í 2016 kom fram, at einki skelti var, sum segði, at tað ikki var loyvt at taka upp video ella at taka myndir. Hetta var so umrøtt, og avgjørt var at seta skeltir upp. Samskift varð við lógardeildina fyri at tryggja, at tað var í ordan at seta skeltir upp. Eg, sum deildarleiðari í Tolldeildini, havi heimild, sambært Roknskaparreglunum hjá TAKS, at taka avgerð í øllum dagligum spurningum á deildini, og havi dagligu leiðsluna av starvsfólkunum, og eg gav starvsfólkunum, sum starvast í Tolleftirlitinum, boð um at seta skeltir upp á teimum økjum, sum vit arbeiða í. Tey mettu sjálvi um, akkurát hvar skeltið skuldi hanga. Umráðið, har skeltini hanga, er tó avmarkað til tað staðið, vit arbeiða í, tað vil siga í "tollfiltrinum" á flogvøllinum, tað er har, sum vit gera eftirlit, og í garaguni á Farstøðini.

Eg kann í hesum sambandi viðmerkja, at tað ikki er vanligt at skjalfesta avgerðir um innrætting, og í hesum førum var heldur ikki skjalfest akkurát, hvar skeltini vóru sett upp.

...”

Við skrivi, dagfest 9. oktober 2018, varð svarið frá TAKS sent klagaranum til ummælis við eini freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 12. oktober 2018 sendi klagarin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

“...

Tollleiðarin byrjar við at vísa til siðvenju um ikki at loyva mynda- ella videoupptøkum av tollarum ella tolleftirlitinum.

Harnæst vísir Tollleiðarin á, at tað kom fram í 2016, at onki skelti var, sum segði, at tað ikki var loyvt at taka upp video ella at taka myndir, og at hetta var umrøtt og at avgjørt var at seta skeltir upp. Víst var á, at samskift varð við lógardeildina fyri at tryggja, at tað var í ordan at seta skeltir upp, og vísir tollleiðarin annars á, at hann, sambært Roknskaparreglunum hjá Taks, hevur heimild at taka avgerð í øllum dagligum spurningum á deildini.

<u>*Undirritaði skal vísa á, at hetta mál snýr seg ikki um heimildir í roknskaparreglunum, men um heimildir í lógini um fyrisiting.*</u>

<u>*Tað er ikki pláss fyri siðvenju í lógini um fyrisiting*</u>, og tá tolldeildin vendir sær til lógardeildina, so er tað ikki nokk at gera vart við, hvat lógardeildin heldur ella meinar. Sambært fyrisitingarlógini skal samskifti so ella so vera á skrivligum grundarlagi.

Tá hetta ikki sæst vera hent, so er fyrisitingarlógin eftir vanligum fyrisitingarligum reglum ikki hildin.

Lat meg so eisini at enda vísa á, at í øllum europæiskum- og altjóða flogvøllum eru eisini slík tolløki undir videoeftirliti, men bara ikki í Føroyum, tí er hetta mál sera prinsipielt, at myndugleikin sjálvur noktar ferðafólki at tryggja seg sjálvi, skuldu støður tikið seg upp um, at okkurt óvæntað hendir í hesum øki, har onki eftirlit er, sum kann vísa, hvat er hent ella ikki hent.

Av somu orsøk er tað sera umráðandi at vita nágreiniliga, hvat og hvussu myndugleikin hevur samskift um støðuna, so sum kravt er í fyrisitingarlógini.

Tí, sum undirritaði skilir støðuna hjá Tolldeildini í Vágunum, so er umráðandi, at ongin fær innlit í arbeiði hjá tollarum í økinum, sum annars er ein sjálvfylgja alla aðrastaðir í heiminum, har óheftir myndugleikar virka fyri videotrygdini, bæði hjá teimum ferðandi, og hjá starvsfólkunum á tolløkinum.

...”

Við skrivi, dagfest 15. oktober 2018, vórðu viðmerkingarnar hjá klagaranum sendar TAKS til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar. Tann 2. november 2018 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at TAKS hevði boðað umboðsmanninum frá, at TAKS ikki ynskti at gera fleiri viðmerkingar til málið, varð nú farið undir endaligu viðgerðina av hesum málinum.

**Niðurstøða**

Hendan klagan snýr seg um, at TAKS ikki helt fyrisitingarligar reglur í sambandi við, at TAKS setti upp forboðsskeltir fyri mynda- og videoupptøku á tolløkinum á flogvøllinum í Vágum.

**Heimild at seta forboðsskelti upp**

Sambært løggildisgrundregluni (legalitetsprinsippinum) skulu reglur, sum gera inntriv í rættindi hjá einstaklingum við at skerja vanliga virkisfrælsi hjá borgarum ella leggja skyldur á borgarar, hava heimild í lóg. Løggildisgrundreglan hevur sum endamál at verja borgaran móti tilvildarligi útinnan av myndugleika. Hinvegin leggur løggildisgrundreglan ikki forðingar á vanliga virkisfrælsi, sáttmálafrælsi og eigararæði hjá myndugleikum. Ein almennur myndugleiki kann tí til dømis, sum ein og hvør annar eigari, vísa burtur óviðkomandi frá síni ogn, um ikki ferðslan er loyvd sambært lóg ella øðrum reglum. Ein almennur myndugleiki, kann eisini, sum ein og hvør privatur persónur, seta treytir ella forboð fyri myndatøku á einum øki, sum myndugleikin hevur rætt at ráða yvir, hóast økið er frítt atkomuligt.

Tolløkið á flogvøllinum í Vágum er arbeiðspláss hjá TAKS. “Tollfiltrið”, har ferðafólkini ganga ígjøgnum, og har forðsskeltini eru sett upp, er alment atkomuligt, hóast ikki frítt atkomuligt, og má metast at vera ein partur av arbeiðsøkinum, sum TAKS ræður yvir.

Eg meti tí, at TAKS, sum almennur myndugleiki við ræðisrættinum yvir “tollfiltrinum”, kann seta treytir fyri økið, sum t.d. forboð fyri mynda- og videoupptøkum. Eg taki undir við TAKS í, at forboð fyri mynda- og videoupptøkum í “tollfiltrinum” kann setast uttan beinleiðis lógarfesta heimild.

**Fyrisitingarligar grundreglur**

Hóast ein fyrisitingarmyndugleiki í summum førum kann áseta reglur viðvíkjandi rakstri av stovninum uttan beinleiðis heimild í lóg, so mugu reglurnar hava saklig atlit og mugu ikki fara longur enn neyðugt við atliti at endamálinum og virkseminum hjá stovninum.

TAKS upplýsir í viðmerkingum sínum til mín, dagfestar 30. august 2018, at forboðið fyri mynda- og videoupptøkum er grundað á atlitið at eftirlitsvirkseminum, starvsfólkunum og teimum ferðandi, sum av einhvørjari orsøk verða tikin til viks ella fáa viðføri sítt kannað í kanningarøkinum. Hesi atlit meti eg vera saklig og lóglig.

TAKS upplýsir eisini, at økið, har forboðskeltini hanga, er avmarkað til "tollfiltrið". Hetta meti eg vera í samsvari við lutfalsmeginregluna, tí forboðið fyri mynda- og videoupptøkum røkkur ikki longri enn neyðugt við atliti at endamálinum og virkseminum hjá tollmyndugleikunum.

Tað, at TAKS setti upp forboðsskeltir fyri mynda- og videoupptøkum í "tollfiltrinum", var ikki ein fyrisitingarlig avgerð, men tengt at ræðisrættinum hjá TAKS yvir økinum. TAKS hevði tí ikki skyldu at skriva upplýsingar upp hesum viðvíkjandi, sambært § 6, stk. 1 í innlitslógini (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001).

Hóast talan ikki var um eina fyrisitingarliga avgerð, so meti eg, at TAKS, sambært góðum fyrisitingarsiði, átti at havt skjalfest samskiftið millum lógardeildina og deildarleiðaran á Tolldeildini. Á henda hátt kundi lættliga verðið staðfest, nær forboðsskeltini vórðu sett upp, hvat øki forboðið snúði seg um, hvørji atlit vóru grundarlag fyri forboðnum, og um hesi vóru saklig og í samsvari við fyrisitingarligar grundreglur.

Samanumtikið meti eg, at TAKS hevði heimild at seta upp forboðsskelti fyri mynda- og videoupptøkum í "tollfiltrinum" í Vágum. Eg meti eisini, at forboðið er sakligt grundað, og at fyrisitingarligar grundreglur vórðu hildnar í sambandi við avgerðina.

Eg geri tí ikki meira við málið.

Sólja í Ólavsstovu
Løgtingsins umboðsmaður